Nr. 56 - 20. mars 2004 Sosialurin 19

# Fleiri klagur um útlendska arbeiðsmegi í Føroyum

**– Útlendingar, ið koma henda veg til ítrótt fyri ymisk ítróttafeløg, kunnu ikki hava framíhjárætt til arbeiði, sigur Føroya Arbeiðarafelag**

ÚTLENDSK ARBEIÐSMEGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er at fegnast um, at landsstýrismaðurin í innlendismálum tekur spurningin um útlendska arbeiðsmegi í Føroyum í álvara.

Tað sigur Føroya Arbeiðarafelag í ársfrágreiðing síni, sum varð løgd fram á aðalfundi felagsins í gjár. Felagið sigur, at tað vísir seg í summum førum at vera ein trupulleiki fyri okkum, at vit fáa útlendska arbeiðsmegi inn í landið.

– Í fyrsta lagi, tí als einki eftirlit er við, hvar tey arbeiða. Tá ið tey fyrst eru komin til arbeiðis á einum føroyskum virki, hendir ofta, at tey fara av virkinum til aðra fyritøku at arbeiða, hóast arbeiðsloyvi bara er galdandi fyri tað ávísa virkið, tey fingu arbeiði á, tá ið tey komu til landið.

Føroya Arbeiðarafelag sigur, at tey hava fingið fleiri klagur um, at útlendsk arbeiðsmegi leggur hald á arbeiði hjá føroyskum verkafólki.

– Tað kann als ikki vera rætt, tí fólkið, ið her býr, má hava fyrsta rætt til arbeiði, serliga nú, ið tað minkar nógvastaðni, sigur Ingeborg Vinther í ársfrágreiðingini hjá Føroya Arbeiðarafelag

Men samstundis vísir hon á, at landsstýrismaðurin í innlendismálum hevur gjørt greitt, at hann fer at fylgja hesum upp, og at útlendingar kunnu ikki koma fram um okkara egnu arbeiðsmegi.

– Tað er gott, at málið verður tikið upp í álvara, tí tað ber ikki til at flyta inn arbeiðsmegi í ringum tíðum.

Hon leggur kortini dent á, at Føroya Arbeiðarafelag hevur einki ímóti, at útlendingar koma henda vegin.

– Men alt skal vera við skili og útlendingar, ið koma henda veg til ítrótt fyri ymisk ítróttafeløg, kunnu ikki hava framíhjárætt til arbeiði, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag í ársfrágreiðing síni til aðalfundin í gjár.



*Føroya Arbeiðarafelag hevur onki ímóti, at útlendingar koma til Føroya at arbeiða, men tað skal vera við skili og teir skulu ikki taka arbeiði frá føroyingum. Myndin er frá aðalfundinum í gjár*

*Mynd: Maria Olsen*



*Føroya Arbeiðarafelag sigur, at sum støðan er nú, er ikki ráð til nakran skattalætta og felagið mælir samgonguni til at sleppa ætlanini um skattalætta, fyribils. Myndin er frá aðalfundinum í gjár*

*Mynd: Maria Olsen*

# Tápuligt at hava fingið alment kjak um lønarsteðg fyri skattalætta

**Javnaðarflokkurin á tingi hevur fingið at vita frá formonnunum í fleiri arbeiðarafeløgum, at tey góðtaka ikki ein skattalætta, sum bara kemur teimum høgu inntøkunum til góðar**

SKATTALÆTTI OG LØNARSTEÐGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er tápuligt er, at vit skulu hava fingið eitt alment kjak um at seta lønarsteðg í verk afturfyri at fáa skattalætta.

Tað staðfestir Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag á aðalfundinum í felagnum í gjár.

Hon sigur, at tað hevur onki við veruleikan at gera at tosa um, at vit skulu hava lønarsteðg aftur fyri at fáa ein skattalætta.

– Tað, sum eg havi boðað frá, er, at fekst ein munandi skattalætti, og vøkstur fekst í keypiorkuna, kundi møguleiki verið fyri, at lønarkrøvini til einar komandi samráðingar gjørdust minni,.

Hon vísir á, at ein kanning frá grannskoðaravirki vísir, at vit í Føroyum liggja á odda, tá ið tað kemur til skattatrýst.

– Vit vita øll, at tað kostar at reka eitt samfelag, og tí er neyðugt, at peningur kemur inn. Men byrðarnar eiga at verða lagdar rættvíst á herðarnar og ikki ov nógv tikið inn frá skattaborgarunum.

## Ikki ráð til skattalætta nú

Ingeborg Vinther ásannar, at skattalættin, sum tosað hevur verið um, er hetta er ið hvussu so er ikki rættvíst býtt, tí miðal- og láginntøkurnar merkja einki til hetta.

Hon sigur, at hesi góðu árini hevur verið møguleiki at givið skattalætta, ið munar, fyri lág- og miðalinntøkur.

Men hon leggur eisini dent á, at sum fakfelag fer Føroya Arbeiðarafelag ikki at taka undir við skattalætta til háinntøkurnar, so sum talan hevur verið um hjá hesi nýggju samgongu

– Tað hevur javnaðarflokkurin á tingi eisini fingið at vita á fundi við fleiri arbeiðarafelagsformenn, sigur hon.

Ingeborg Vinther sigur eisini, at sum støðan í samfelagnum er í løtuni, har hundraðtals milliónir fara at vanta í komandi fíggjarlóg, heldur hon, at vit hava ikki ráð til nakran skattalætta.

– Tilmælið hjá Føroya Arbeiðarafelag til samgonguna skal vera, at ráð ikki eru til skattalætta nú, tí tað nyttar ikki at geva skattalætta eitt ár og noyðast taka hann inn aftur árið eftir við hækkaðum avgjøldum.

– Meðan undirskot er á fíggjarlógini, er betri, at einki verður gjørt við skattalættan, tí vit mugu gera okkum greitt, at peningurin, sum vantar í, má koma onkustaðni frá.

## Hava borið statinum 900 milliónir

Hon sigur, at tey, sum áttu at vita betur, siga nú, at ongin hevði væntað, at búskaparliga støðan var so vánalig.

– Men longu, tá ið blokkurin varð skorin 366 milliónir krónur, hómaðust myrk skýggj á luftini, og tað boðaði ikki frá góðum tíðum. Har umframt brúkti undanfarna samgongan 500 milliónir av av tøkum gjaldføri til eitt framskundað afturgjald av tatsláni.

Ingeborg Vinther heldur, at hetta kundi havt bíðað.

– Nú eru næstan 900 milliónir kr.onur bornar statinum aftur í eini tíð, har brúk var fyri hvørjum oyra.

– Og nú standa vit so við einum undirskoti á fíggjarlógini.

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at var eitt sindur av skili verið í fíggjarpolitikkinum hjá undanfarnu samgongu, hevði tað verið øðrvísi.

– Sjálvandi skulu vit gerast fíggjarliga sjálvbjargin sum tjóð, eingin ivi um tað, men blokkurin má skerjast við skili og ikki so ógvisliga. Nú verður ikki lætt at fáa alt at hanga saman, og fryktandi er fyri, at borgarin fær rokningina, sigur hon.

# Eini 1000 arbeiðspláss í váða

**Føroya Arbeiðarafelag fýlist á, at føroyska vinnulívið ikki hevur brúkt tær góðu tíðirnar til at bøta um kappingarførið og til at endurnýggja seg**

ARBEIÐSLOYSI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tær góðu tíðirnar vóru ikki nýttar til at bøta um kappingarførið hjá føroyska vinnulívinum og til at endurnýggja tað.

Tað staðfestir Førooya Arbeiðarafelag í ársfrágreiðing, sum varð løgd fram á aðalfundinum í gjár.

Føroya Arbeiðarafelag ásannar, at vit komin í ta støðu, at arbeiðsloysið veksur, og at nógvir av limunum í Føroya Arbeiðarafelag hava mist arbeiðið.

– Serliga innan alivinnuna er hetta ein royndur lutur og í løtuni eru eini 1000 arbeiðspláss í váða innan alivinnuna.

Felagið sigur, at fara øll hesi arbeiðspláss fyri skeytið, kemur hetta sanniliga at merkjast í samfelagnum.

Tí vónar Føroya Arbeiðarafelag, at politiski myndugleikin ikki letur standa til, men tekur stig til, at alivinnan og øll arbeiðsplássini har ikki hvørva.

– Tað verður ein dyggur smeitur fyri tey, ið missa arbeiðið, og eisini fyri alt samfelagið, tí nú lítið arbeiðið er, verður ikki so lætt at fáa annað arbeiði.

Føroya Arbeiðarafelag sigur eisini, at vinnuligi trupulleikin er nógvastaðni í dag, men er serligur ringur í Suðuroyar syðru helvt.

## Harmiligt at hoyra jammurin frá vinnuni

Men tað, sum harmar Føroya Arbeiðarafelag mest, er at hoyra jammurin frá vinnuni nú, sum felagið tekur til.



*– Tey, ið ferð eftir ferð kæra seg í fjølmiðlunum um tímalønina hjá verkafólkinum, skuldu heldur tikið í egnan barm og hugsað eitt sindur um, hvat teirra lønir kosta vinnulívi okkara, sigur Ingeborg Vinther Myndin er av aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag í gjár*

*Mynd: Maria Olsen*

– Vit hava í fleiri ár havt bestu tíðir í Føroya søgu. Men, hvat gjørdi vinnan tá? spyr Føroya Arbeiðarafelag. Gjørdi hon nakað fyri at endurnýggja seg og bøta um kappingarførið á tí alt meira krevjandi marknaðinum? spyr Føroya Arbeiðarafelag eisini.

Og felagið svarar sjálvt:

– Nei, tær góðu tíðirnar vóru ikki nýttar til at bøta um tað, sigur Føroya Arbeiðarafelag.

Í staðin fyri at endurnýggja seg og bøta um kappingarførið, hevur vinnan hildið fast um gamla framleiðslumynstrið og gomlu vørusløgini.

Men nú eru tíðirnar ikki so góðar longur, heldur ikki niðri í Evropa og sostatt er eftirspurningurin minkandi og prísurin fallandi.

Hvat ger vinnan tá? Jú, hon skal finna sær ein syndabukk, og tað er verkafólkið, tí nú skal tímalønin hjá teimum vera vaksin so nógv, at vinnan ikki er kappingarfør, sigur Føroya Arbeiðarafelag.

Felagið sigur, at hinvegin hoyrdist onki um kappingarførið, tá ið lønin hjá verkafólki stóð í stað í 10 ár?

– Tá søgdu virkisleiðarar einki. Tað er ógvuliga vánaligt og ómansligt dag um dag at hoyra frá Vinnuhúsinum, at vinnan ikki skal vera kappingarfør, tí lønarhækkingarnar hava verið ov stórar, sigur Føroya Arbeiðarafelag.

– Men tað, sum nú bagir onkrum av hesum stjórum, ið nú gremja seg, man ivaleyst vera, at umframt at hava eina løn, ið svarar til 10 verkamannalønir, hava teir eisini fingið bonus av vinninginum. Og nú minkar hetta bonusið, og sjálvandi skal tað ganga út yvir tey tímaløntu.

Felagið undrast á, at tað bara verður tosað um tey lægst løntu.

– Einki grenj hoyrist um lønirnar hjá „bossunum" í privatu vinnuni og um, hvussu tær munnu ávirka kappingarførið

– Vit hoyra heldur ikki eitt kis um aðrar lønarbólkar. Eg haldi, at tey, ið ferð eftir ferð kæra seg í fjølmiðlunum um tímalønina hjá verkafólkinum, skuldu heldur tikið í egnan barm og hugsað eitt sindur um, hvat teirra lønir kosta vinnulívi okkara, sigur Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag bersøgin í ársfrágreiðingini á aðaldundinum í gjár.

# Arbeiðsgevari koyrdur á heysin tí hann ikki betalti løn

**Føroya Arbeiðarafelag hevur nógv stríð av arbeiðsgevarum, sum ikki betala løn**

LØNAREFTIRSTØÐA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað kann vera dýrt hjá arbeiðsgevarum, ikki at betala arbeiðsfólki ta løn, sum tey eiga eftir sáttmálanum.

Tað hava fleiri arbeiðsgevarar sannað, sigur Ingeborg Vinther, í ársfrágreiðing síni á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag í gjár.

Hon sigur, at Føroya Arbeiðarafelag hevur havt nøkur mál, har limir okkara ikki fingu ta sáttmálaásettu lønina og uppsagnarløn sína

Tí var neyðugt at heita á advokat okkara um at krevja peningin inn við hjálp frá rættinum.

– Í einum føri flutti arbeiðsgevari av landinum, og eftir stóð verkafólk, sum hevði rættiliga stórt lønarkrav til góðar.

Ingeborg Vinther sigur, at málið varð sent til danskan advokat, og endin varð, at arbeiðsgevarin varð koyrdur á húsagang.

– Men tá ið arbeiðsgevarin ongar ognir átti, misti nevndi limur lønaráogn sína kortini.

Viðmerkjast skal, at ikki bar til at lata Trygdargrunninum nevnda lønarkrav, tí trygdin, sum hesin grunnur veitir løntakarum, er so syndarliga vánalig, og fráboðanarfreistirnar eru stuttar, sigur Ingeborg Vinther

Hon sigur, at í einum øðrum máli varð løntakari sagdur upp, og arbeiðsgevarin gjørdi vart við, at maðurin var tímaløntur og tí bert átti rætt til 20 daga uppsagnarfreist.

Men Føroya Rættur staðfesti, at løntakarin átti tríggjar mánaða uppsagnarfreist, tí hann var at meta sum fastløntur.

– Arbeiðsgevarin førdi í rættinum fram, at hóast løntakarin hevði fingið somu upphædd útgoldna hvønn mánað, so var talan um tímaløn, sum av praktiskum grundum varð goldin út sum føst upphædd hvønn mánað.

Men hetta svølgdi rætturin ikki og sostatt fekk løntakarin viðhald í, at hann átti tríggjar mánaða uppsagnarfreist.